Beinta Løwe Jacobsen **Nr. 88/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um alment innlit, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at almenningurin og fjølmiðlar fáa alment innlit í, hvørjar fyritøkur hava fingið stuðul úr landskassanum í sambandi við hjálparpakkarnar, ið Løgtingið samtykti?
2. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at almenningurin og fjølmiðlar fáa alment innlit í, hvørjar fyritøkur hava fingið stuðul úr Als í sambandi við hjálparpakkarnar, ið Løgtingið samtykti?

Viðmerkingar:

Í mars mánaði samtykti Løgtingið tveir hjálparpakkar til tess at hjálpa vinnulívinum í truplu støðuni, eftir at landið varð latið aftur.

Í viðmerkingum til tingmál nr. 135/2019, fyrri hjálparpakkin, stendur í viðmerkingum: "Landsstýrismaðurin eigur at tryggja fullan opinleika og alment innlit í, hvørjar fyritøkur verða fevndar av stuðulsskipanini".

Sostatt er tað vilji Løgtingsins, at almenningurin skal hava møguleika at fáa innlit í málini.

Sum skilst hava fjølmiðlar biðið um alment innlit, men hava fingið noktandi svar. Hetta er ikki í samsvari við tað, ið Løgtingið samtykti. Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum.

Á Løgtingi, 15. mai 2020

Beinta Løwe Jacobsen